NORÐOYA SPARIKASSI

# Ársfrásøgn 2013

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tel. 475000

Deildin í Saltangará:
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. 475000
Fax 476012

Deildin í Tórshavn:
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# Innihaldsyvirlit


| | |
|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | 4 |
| ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA | 5 |
| LEIÐSLUFRÁGREIÐING | 6 |
| ROKNSKAPARFRÁGREIÐING | 7 |
| VÁÐAR OG VÁÐASTÝRING | 11 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR | 15 |
| FÍGGJARSTØÐA - OGN | 16 |
| FÍGGJARSTØÐA - SKULD | 17 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI | 18 |
| YVIRLIT YVIR NOTUR | 19 |
| NOTUR - SOLVENSUPPGERÐ | 20 |
| NOTUR - NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 21 |
| NOTUR - 5 ÁRA-YVIRLIT | 28 |
| NOTUR | 29 |
| NEVND, GRANNSKOÐARANEVND OG STJÓRN | 40 |
| UMBOÐSRÁÐ | 42 |

# Leiðsluátekning

Vit hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2013 fyri Norðoya Sparikassa.

Ársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu við ársenda og úrslitinum fyri 2013.

Somuleiðis er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rætta frágreiðing um gongdina í virksemi sparikassans og fíggjarligu støðu, umframt eina frágreiðing av teimum mest týdningarmiklu váðum og óvissum, ið sparikassin kann verða ávirkaður av.

Ársfrásøgnin verður viðmælt umboðsráðsfundinum at góðkenna.

Klaksvík, 20. mars 2014.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

John P. Danielsen
formaður

Jóannes Hansen
næstformaður

Jóhanna á Tjaldrafløtti

Kristian Martin Rasmussen

Karl Heri Joensen

Petur Alberg Lamhauge

Julianna Thomsen

Guðrið Lava Olsen

Tummas Martin Sólsker

Umboðsráðsfundur
Góðkendur á umboðsráðsfundi tann 27. mars 2014

Niels Winther Poulsen, adv.
fundarstjóri

# Átekning frá óheftum grannskoðara

## Til umboðsráðslimirnar í Norðoya Sparikassa

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Norðoya Sparikassa fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2013 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum, herundir nýttum roknskaparhátti fyri sparikassan. Ársroknskapurin er gjørdur sambært lóg um fíggjarligt virksemi, herundir kunngerðir um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at orða ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi og kunngerðir um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar. Leiðslan hevur somuleiðis ábyrgd av tí innanhýsis eftirliti, sum leiðslan metir neyðugt, til tess at ein ársroknskapur kann gerast, uttan skeivleikar av týdningi og uttan mun til, um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

## Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at orða eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað í samsvari við altjóða standardum um grannskoðan og øðrum krøvum sambært galdandi grannskoðaralóggávu. Hetta krevur, at vit lúka tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiðið, ið skal til, fyri at fáa grannskoðaraprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið er neyðugt, fyri at stovnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at orða eina niðurstøðu um góðskuna á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin umfatar eisini støðutakan til, um roknskaparhátturin, ið leiðslan hevur nýtt, er hóskandi, um roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og eina heildarmetan av samlaða ársroknskapinum.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðaraprógv, sum er hóskandi grundarlag fyri niðurstøðu okkara.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum sparikassans tann 31. desember 2013, umframt úrsliti av sparikassans virksemi fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2013 í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi, herundir kunngerðir um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar.

## Útsøgn um leiðslufrágreiðingina

Vit hava, samsvarandi lóg um fíggjarligt virksemi, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki framt onnur stig afturat tí framdu grannskoðanini av ársroknskapinum.

Tað er við grundarlagi í hesum okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Klaksvík, 20. mars 2014

BDO
Statsautoriseret revisionsaktieselskab

Jens Peter Egebjerg Hansen
Statsautoriseret revisor

Klaksvík, 20. mars 2014

Numo Sp/f
Løggilt grannskoðaravirki

Símun Absalonsen
Løggildur grannskoðari

# Leiðslufrágreiðing

## Virksemi

Sparikassans virksemi er at veita fíggjarligar tænastur til bæði privat og vinnurekandi viðskiftafólk um alt landið. Sparikassin ynskir at veita viðskiftafólkum sínum eitt fjølbroytt úrval av fíggjarligum tænastum og hartil eina holla, professionella ráðgeving.

## Óvissur í sambandi við virðisáseting

Størstu óvissurnar í sambandi við virðisásetingar eru knýttar at niðurskrivingum av útlánum, burturleggingum upp á ábyrgdir, avsetingum móti skyldum og virðisáseting av yvirtiknum ognum. Arbeitt verður støðugt við at betra og menna nýggjar arbeiðshættir til hesar virðisásetingar, og metir sparikassin, at óvissan er á einum støði, sum ikki hevur stóran týdning í sambandi við roknskapin.

## Óvanlig viðurskifti

Sparikassin hevur í desember 2013 afturgoldið 25,5 mió. kr. av hybrida kjarnukapitalinum frá danska statinum, soleiðis at hybridi kjarnukapitalurin minkar úr 50,6 mió. kr. niður í 25,1 mió. kr. Afturgjaldingin upp á 25,5 mió. kr. er fíggjað við 10 ára ábyrgdarláni frá føroyskum íleggjarum til eina lægri rentu. Samlaða sparingin av hesi umfígging er mett at vera umleið 0,7 mió. kr. um árið í rentuútreiðslum, umframt spard virðisjavnan.

## Gongdin í 2013

Úrslitið áðrenn skatt í 2013 gjørdist eitt avlop á 5,5 mió. kr., móti einum halli á 3,8 mió. kr. í 2012. Úrslitið í 2013 er í høvuðsheitum merkt av, at vanligi raksturin er batnaður og niðurskrivingar upp á útlán eru minkaðar. Úrslitið er eisini í samsvari við metingarnar í ársfrásøgnini fyri 2012. Sparikassin er sum heild væl nøgdur við úrslitið fyri 2013.

Verður sæð burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum, hevði sparikassin eitt avlop av vanligum rakstri í 2013 upp á 19 mió. kr. móti 17,6 mió. kr. í 2012. Hetta er ein framgongd í vanliga rakstrinum upp á 1,4 mió. kr. svarandi til 8 %.

Í ársfrásøgnini fyri 2012 varð mett, at úrslitið av vanligum rakstri, tá sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum, fór at gerast eitt avlop upp á umleið 20 mió. kr. Sparikassin kann nú staðfesta, at úrslitið bleiv á leið tað sum roknað varð við.

Aðrir málsetningar, sum boðað varð frá í ársfrásøgnini fyri 2011 og 2012, vóru at minka um kredittváðan mótvegis stórum kundum og styrkja solvensin enn meiri. Lyklatalið fyri stórar kundar gjørdist 40,9 % í 2013, móti 56,8 % í 2012, sum er ein minking á 15,9 %-stig. Solvensurin hækkaði við 1,3 %-stigum til 19,4 % í 2013 úr 18,1 % í 2012. Við einum solvenstørvi upp á 12,2 % hevur sparikassin ein solvensyvirdekning upp á 7,2 % stig.

Tað eydnaðist í 2013 at økja um útlánini við lægri váða, soleiðis at samlaði kredittváðin minkaði og góðskan á útlánum batnaði. Nýggja deildin í Fuglafirði hevur fingið góða undirtøku og hevur í 2013 verið eitt gott íkast til útlánsvirksemið hjá sparikassanum. Hesi tiltøk síggjast aftur í roknskapinum við størri avlopi av vanligum rakstri og eisini hægri solvensi.

## Rentupolitikkur fyri ábyrgdarpening

Í fjør komu nýggjar reglur í gildi viðvíkjandi renting av ábyrgdarpeningi. Sparikassin hevur ikki skyldu at gjalda rentu av ábyrgdarfænum, men sparikassin hevur ein rentupolitikk, so ábyrgdarin hevur møguleika at meta um útlitini fyri at fáa rentu. Umboðsráðsfundurin tekur støðu til rentuna eftir tilmæli frá nevndini og eftir umboðsráðsfundin í fjør, varð fyri fyrstu ferð útgoldin renta eftir nýggju skipanini. Rentan var 5 % omanfyri hægstu innlánsrentu fyri 12 mðr. uppsøgn, sum gav í meðal 6,2 % fyri árið. Í ár verður aftur mælt til at fylgja sama rentupolitikki. Harvið verður rentan í meðal 6 %.

Í 2012 bleiv eisini latið upp fyri at tekna meira ábyrgdarpening enn gamla markið upp á kr. 20.000. Nú er einki mark, men ynskir ein ábyrgdari at tekna meira enn 300.000 kr., skal tað góðkennast av nevndini. Líkt er til, at ábyrgdarar eru væl nøgdir

við rentuna og hevur sparikassin merkt ein øktan áhuga fyri at seta pening í ábyrgdarfæ. Samlaða ábyrgdarfæið var við árslok 2013 kr. 8.182.000, móti kr. 6.795.000 í 2012. Hetta er ein øking upp á kr. 1.387.000, ella 20,4 %. Síðan ársskiftið er komið meira afturat og hetta fegnast sparikassin um.

### Realkreditt

Sparikassin byrjaði seinasta heyst at veita realkredittlán frá DLR. Eftir at tey fyrstu lánini eru avgreidd, kann staðfestast, at skipanin virkar væl. Kappingin um rentuna á bústaðarláni við 1. veðrætti merkir, at rentumunurin millum bústaðarlán frá bankunum og realkredittlán er minkaður. Tí er eftirspurningurin eftir realkredittlánum nakað minkaður.

Fyri sparikassan hevur tað havt jaliga ávirkan at kunna veita realkredittlán. Tað ger at sparikassin hevur allar møguleikar at kappast um kundarnar, sum skulu byggja ella keypa hús. Veljast kann ímillum fasta ella skiftandi rentu alt eftir um kundin vil tryggja sær stabil viðurskifti ella heldur vil hava lægri rentu og størri fleksibilitet.

## Roknskaparfrágreiðing

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar gjørdust 72,8 mió. kr. í 2013 í mun til 75,8 mió. kr. í 2012. Tað svarar til eina afturgongd upp á 3 mió. kr., sum er ein minking upp á 3,9 %. Her skal havast í huga, at sparikassin seinastu árini hevur havt sum málsetning at minka um kredittváðan mótvegis stórum kundum.

### Virðisjavnan

Virðisjavnan vísir eitt avlop upp á 1,3 mió. kr. fyri 2013 sammett við eitt hall upp á 4,3 mió. kr. undanfarna ár. Høvuðsorsøkin til positivu gongdina í virðisjavnanum í 2013, er eitt avlop við avhending av fíggjartólum.

### Útreiðslur til starvsfólk og umsiting

Samlaðu útreiðslurnar til starvsfólk og umsiting gjørdust 50,9 mió. kr. í 2013 móti 54 mió. kr. í 2012, ella ein minking upp á 3,1 mió. kr., sum svarar til 5,8 %. Hesin postur er samansettur av løn til stjórn og starvsfólk, umframt øllum vanligum rakstrarútreiðslum, og rakstrarútreiðslur í samband við fyribils yvirtiknar ognir.

Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn var 2,8 mió. kr. í 2013 sum er á leið tað sama sum undanfarna ár.

Løn og eftirløn til starvsfólk gjørdust 19 mió. kr. í 2013 móti 21,4 mió. kr. í 2012, sum var ein minking upp á 2,4 mió. kr. Høvuðsorsøkin til minkingina er, at sparikassin í 2013 avsetti minni móti skyldugum lønum og frítíðarlønum enn í 2012. Talið av ársverkum er tó minkað við 1,1 niður til 45,1 í 2013, í mun til 46,2 í 2012. Útreiðslur til sosiala trygd eru lønarhæddaravgjald, ALS, grunnar v.m., og eru hesar á sama støði sum árið fyri. Av tí, at peningastovnsvirksemi ikki er mvg-skyldugt, er ístaðin álagt peningastovnum at gjalda 12 % av øllum útgoldnum lønum til landskassan. Landskassin hevur frá 2013 økt um hetta gjaldið við 2 %-stigum úr 10 % upp í 12 %.

Útreiðslur til umsiting lækkaðu til 22,6 mió. kr. í 2013, frá 23,2 mió. kr. í 2012, sum er ein minking upp á 0,6 mió. kr. ella 2,5 %. Sparikassin hevur fyrr boðað frá, at arbeitt verður miðvíst við at tillaga kostnaðarstøðið til minkandi útlánsvirksemi, og hevur hetta arbeiðið gingið eftir ætlan.

### Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum vóru 2,1 mió. kr. í 2013, í  mun til 3,3 mió. kr. í 2012, sum er ein minking upp á 1,2 mió. kr. Umframt avskriving av rakstrargøgnum, eru í hesum posti avskrivingar av egnum føstum ognum, sum sparikassin nýtir til sítt virksemi, umframt avskriving av innrætting av leigaðum hølum.

## Aðrar rakstrarútreiðslur

Aðrar rakstrarútreiðslur í 2013 vóru 3,6 mió. kr., har meginparturin eru útreiðslur til Innskjótaratrygdargrunnin. Hesin postur var í 2012 2,6 mió. kr. Frá mars 2012 varð gjaldið til Innskjótaratrygdargrunnin umskipað til eitt fast árligt gjald upp á 0,25 % av dekkaðu nettoinnlánunum hjá sparikassanum. Hetta gjald verður liðugt at gjalda í 2015.

## Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar

Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar gjørdust 14,9 mió. kr. í 2013, móti 17,1 mió. kr. í 2012, sum er ein minking upp á 2,3 mió. kr.

Sparikassin skrivaði í ársfrásøgnini fyri 2011, at tann versti parturin av fíggjarkreppuni var av, men at eftirskjálvtar av fíggjarkreppuni verða framhaldandi at síggja í roknskapunum næstu árini. Hetta er fyri stóran part tað, sum sæst aftur í niðurskrivingum. Eisini varð nevnt, at í 2012 kom í gildi dagføring av donsku kunngerðini um fíggjarligar frásagnir, sum millum annað nágreinar reglurnar um niðurskrivingar hjá peningastovnum. Við støði í hesi kunngerð hevur Fíggjareftirlitið í 2013 gjørt uppskot til nýggja niðurskrivingarvegleiðing, sum út í æsir nágreinar nær ein kundi skal niðurskrivast. Sjálvt um vegleiðingin frá 2013 formliga ikki er sett í gildi enn, hevur sparikassin tó valt at fylgja hesum reglum og hevur hetta ført til øktar niðurskrivingar.

## Kapitalpartar í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum

Sparikassin hevur ikki kapitalpartar í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum.

## Skattur

Sparikassin hevur í roknskapinum fyri 2008 og 2009 aktiverað skatt av halli fyri tilsamans 16,2 mió. kr. Íroknað hallið frá 2010 til 2012 er samlaða óbrúkta skattliga hallið nú 165,5 mió. kr. Fíggjareftirlitið hevur í skrivi til peningastovnarnar í desember 2012 hert krøvini, og hevur víst á, at virðisáseting av aktiveraðum skatti skal byggja á varligar metingar og skulu kunna skjalprógvast. Sparikassin valdi tí í 2012 at niðurskriva útsetta skattin frá 16,2 mió. kr. til 0 kr. Tá samlaða óbrúkta skattliga hallið frá undanfarnum árum er størri enn skattskylduga avlopið fyri 2013 hevur sparikassin ikki útreiðsluført skatt í 2013.

## Fíggjarstøða

Fíggjarstøða sparikassans gjørdist 1.925,9 mió. kr. í 2013, í mun til 1.979,1 mió. kr. í 2012, sum er ein minking upp á 53,2 mió. kr., ella 2,7 %.

Útlán hækkaðu við 5,1 mió. kr. til 1.485,5 mió. kr. í 2013, sammett við 1.480,4 mió. kr. í 2012, sum er ein hækking upp á 0,3 %.

Innlán hækkaðu við 49,4 mió.kr. til 1.687,8 mió. kr. í 2013, sammett við 1.638,4 mió. kr. í 2012, sum er ein hækking upp á 3 %.

Í 2011 hevði sparikassin eitt innlánsundirskot upp á 38,6 mió. kr., men í 2012 var hetta vent til eitt innlánsavlop upp á 158 mió. kr. Í 2013 øktist innlánsavlopið við 44 mió. kr. til 202 mió. kr

Broytingar í muninum millum innlán og útlán ávirkar eisini útlánsprosentið, sum í 2013 minkaði við 2,9 %-stigum til 91 %.

Skyldur, ið ikki eru førdar í fíggjarstøðuna, lækkaðu í 2013 til 38,3 mió. kr. frá 42,9 mió. kr. í 2012, sum er ein minking upp á 4,6 mió. kr.

Sparikassin hevur seinastu árini havt sum mál, at økja um innlánini og harvið minka um útlánsprosentið, og metir nú bæði innlánsavlop og útlánsprosent vera á einum hóskandi støði. Við tað at hetta málið nú er rokkið, er gjaldførið styrknað, og sparikassin er nú klárur til kapping um kundarnar á einum sunnum grundarlagi.

## Eftirstillað kapitalinnskot

Í 2009 tók sparikassin eftirstillað lán frá statinum á 50,6 mió. kr. - sokallaðan hybridan kjarnukapital. Hetta lánið kann afturgjaldast í tíðarskeiðinum 10.09.2012 - 09.09.2014 til kurs 100, 10.09.2014 - 09.09.2015 til kurs 105 og eftir hetta til kurs 110. Sparikassin hevur fyrr boðað frá, at sambært kapitalætlanini, væntast meginparturin av hesum láni at verða afturgoldin áðrenn 09.09.2014, har ein partur verður umfíggjaður við øðrum eftirstillaðum láni við lægri rentu. Restin av lánsupphæddini verður afturgoldin áðrenn 09.09.2015. Sambært roknskaparreglunum hjá Fíggjareftirlitinum hevur sparikassin tikið kurshækkingina við í roknskapir frá 2012 við eini upphædd, sum er afturdiskonterað við lánirentuni.

Sparikassin hevur í desember 2013 afturgoldið 25,5 mió. kr. av hybrida kjarnukapitalinum frá danska statinum, soleiðis at hybridi kjarnukapitalurin minkar úr 50,6 mió. kr. niður í 25,1 mió. kr. Afturgjaldingin upp á 25,5 mió. kr. er fíggjað við 10-ára ábyrgdarláni frá føroyskum íleggjarum til eina lægri rentu. Samlaða sparingin av hesi umfígging er mett at vera umleið 0,7 mió. kr. um árið í rentuútreiðslum, umframt spard virðisjavnan.

## Gjaldføri

Stóra broytingin frá innlánsundirskoti til innlánsyvirskot í 2012 og 2013 hevur givið sparikassanum gott gjaldføri. Í hesum sambandi hevur sparikassin nýtt møguleikan til afturgjalding av láni við statsveðhaldi og láni frá tjóðbankanum. Eftir at hesi lán eru afturgoldin, er yvirdekningurin í mun til lógarkravið uppgjørdur til 188,2 % við árslok 2013 í mun til 172,7 % við árslok 2012.

## Eftirlitsdiamanturin

Fíggjareftirlitið setti í 2012 í gildi ein sokallaðan eftirlitsdiamant. Har verða nevnd fimm ávaringartekin, sum kunnu geva ábendingar um, at ein peningastovnur hevur ov høgan váða. Niðanfyri er ein stutt frágreiðing um, hvussu váði sparikassans er í mun til hesi ávaringartekin.

Samanumtikið er sparikassin væl innanfyri hesi fimm ávaringartekin:

- **Stórir kundar tilsamans** (skulu vera undir 125 % av basiskapitalinum):
  Stórir kundar tilsamans eru við árslok 2013 uppgjørdir til 40,9 % av basiskapitalinum.
- **Útlánsvøkstur** (skal vera minni enn 20 % um árið):
  Sparikassin hevði í 2013 ein útlánsvøkstur upp á 0,3 %.
- **Útlán til fastognir** (skulu vera minni enn 25 % av samlaðu útlánunum):
  Við árslok 2013 vóru útlán sparikassans til fastognir 5,2 % av samlaðu útlánunum.
- **Fíggingarlutfall** (útlán/arbeiðandi kapitalur minus lánsbrøv við restáramáli undir 1 ár, skal vera minni enn 1):
  Sparikassin hevur uppgjørt fíggingarlutfallið til 0,8 við ársenda 2013.
- **Gjaldførið yvir lógarinnar kravi** (skal vera størri enn 50 %):
  Sparikassin hevur við ársenda 2013 uppgjørt gjaldførið yvir lógarinnar kravi til 188,2 %.

## Solvensur og kapitalviðurskifti

Basiskapitalur sparikassans, eftir at avlopi fyri 2013 er lagt afturat, er 212,4 mió. kr.

Solvensur sparikassans við árslok 2013 er uppgjørdur til 19,4 % móti 18,1 % við árslok í 2012.

Umframt at gera upp lógarkravda solvensin skal sparikassin gera upp ein individuellan solvenstørv, sum við árslok 2013 er uppgjørdur til 12,2 % móti 11,4 % við árslok 2012. Hetta er ein øking upp á 0,7 %-stig har sparikassin hevur lagt upp fyri nýggjum krøvum sum koma í 2014.

Fíggjareftirlitið broytti í 2012 grundarlagið undir háttinum, sum verður nýtt til uppgerð av solvenstørvi, frá einum hátti við

sannlíkindi til ein hátt við avsetingum. Meðan hátturin við sannlíkindi byrjar við 0 %, byggir nýggi hátturin á, at peningastovnar, sum minstamark skulu hava ein solvenstørv upp á 8 % av váðavektaðum ognum sum eina avseting móti øllum vanligum váðum, ein peningastovnur átekur sær. Afturat hesum skal avsetast móti váðum, sum liggja útyvir tað vanliga eftir nærri reglum frá Fíggjareftirlitinum. Nýggi hátturin verður vanliga róptur 8+ hátturin, og kunnu peningastovnar í 2012 sjálvir gera av, hvør háttur verður nýttur. Sparikassin hevur frá 4. ársfjórðingi 2012 gjørt solvenstørvin upp eftir 8+ háttinum.

Munurin millum solvens og solvenstørv er 7,2 %-stig, svarandi til ein solvensyvirdekning upp á 60 %. Hetta er eitt mát, sum javnan verður nýtt, tá metast skal um mótstøðuføri móti komandi tapum hjá einum peningastovni.

Sparikassin metir javnan um grundarlagið, mannagongdina og fyritreytirnar, sum eru grundarlagið undir uppgerðini. Nærri er greitt frá um hesi viðurskifti undir váðar og váðastýring.

Leiðslan metir at solvensur sparikassans er nøktandi til tess at dekka tann váða, ið stendst av virksemi sparikassans.

## Nýggj krøv til uppgerð av kapitali og kapitaltørvi

Nýggj kunngerð um uppgerð av kapitali og kapitaltørvi, vanliga nevnd CRD-IV kunngerðin, er ávegis og væntast at koma í gildi í 2014. Eisini hevur Landstýrið fráboðað, at lógin um SIFI peningastovnar verður sett í gildi fyri Føroyar í 2014, og at sparikassin verður SIFI peningastovnur. Hesi lógarkrøv hava millum annað við sær herd krøv til uppgerð av kapitali og kapitaltørvi, og verða hesi stigvíst tikin í nýtslu fram til 2019.

Í stuttum kann sigast, at sambært nýggju CRD-IV kunngerðini skulu allir peningastovnar hava eina eyka kapitalverju upp á 2,5 %-stig, umframt at sparikassin sum SIFI peningastovnur skal hava eina eyka SIFI-kapitalverju upp á 1,5 %-stig. Samanlagt verður hesin eyka kapitaltørvur upp á 4 %-stig lagdur omaná tann individuella kapitaltørvin. Um hesar ásetingar vóru í gildi fyri Norðoya Sparikassa við árslok 2013 hevði kravið til samlaða kapitaltørvin verið 16,2 %. Afturat hesum er møguligt at áleggja øllum peningastovnum eina eyka konjunktur kapitalverju upptil 2,5 %-stig, um útlánsvøksturin í fíggjargeiranum verður ov stórur. Av øðrum krøvum til SIFI peningastovnar kunnu nevnast økt krøv til gjaldføri, krøv um fleiri upplýsingar og oftari vitjan av Fíggjareftirlitinum.

Við støði í hesum kann leiðslan staðfesta, at sparikassin longu í dag hevur nøktandi solvens og gjaldføri til at dekka tann váða, ið stendst av virksemi sparikassans frameftir. Tá ið tað kemur til krøv um fleiri upplýsingar og oftari vitjan av Fíggjareftirlitinum, setur hetta krøv til tann fyrisitingarliga partin, men mett verður ikki at hetta verður nakar trupulleiki fyri sparikassan.

## Grannskoðaranevnd

Í 2013 varð kunngerðin um grannskoðaranevnd sett í gildi fyri Føroyar, sum hevur verið galdandi fyri danskar peningastovnar í nøkur ár. Sparikassin hevur seinastu árini, av sínum eintingum, valt at skipa eina óformliga grannskoðaranevnd, sum arbeiðir eftir donsku kunngerðini, men frá 2013 virkar grannskoðaranevndin formliga eftir føroysku kunngerðini.

Nevnd sparikassans hevur valt eina sjálvstøðuga grannskoðaranevnd, ið er mannað við 3 limum, og eru teir:
John P. Danielsen, Jóannes Hansen og Petur Alberg Lamhauge.

Nevndin hevur eisini innstillað John P. Danielsen sum roknskaparkønan í grannskoðaranevndini sambært ásetingunum í kunngerðini.

Nevnd sparikassans hevur góðkent arbeiðssetning og arbeiðsætlan hjá grannskoðaranevndini.

Arbeiðið í grannskoðaranevndini fevnir millum annað um at fylgja við:

- arbeiðinum at gera roknskap
- um sparikassans innaneftirlit og váðastýring eru á einum nøktandi støði
- arbeiðinum hjá grannskoðanini

Grannskoðaranevndin hevur 2-3 fundir árliga og innstillar til nevndina.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Tað eru ongar hendingar ella viðurskifti eftir roknskaparlok, ið kunnu ávirka metingina av ársfrásøgn sparikassans fyri 2013.

### Meting um 2014

Við lítlum útlánsvøkstri og lágari marknaðarrentu, hevur sparikassin í 2013 enn einaferð megnað at økt um avlopið av vanligum rakstri. Tá sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum, gjørdist úrslitið av vanliga rakstrinum 19 mió. kr. í 2013 móti 17,6 mió. kr. árið fyri.

Við tillagingum av rakstrinum í 2013 er útreiðslustigið lækkað til 74,8 % í 2013 frá 77,2 % í 2012, sum er ein lækking upp á 2,4 %-stig. Væntað verður, at útreiðslustigið fyri 2014 verður á sama støði sum í 2013.

Avlopið av vanligum rakstri í 2013, tá sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum, í mun til útlán og ábyrgdir gjørdist 1,25 % í 2013, í mun til 1,06 % í 2012, sum var ein hækking upp á 0,19 %-stig. Sparikassin miðar eftir at hetta lyklatalið verður á sama støði í 2014.

Um útlánsvirksemið og marknaðarrentan halda sær á verandi støði, er okkara fatan, at útlitini fyri avlopi av vanligum rakstri í 2014 eru á leið tey somu sum í fjør. Um sæð verður burtur frá virðisjavnan og niðurskrivingum upp á útlán, verður talan um eitt avlop av vanligum rakstri upp á umleið 20 mió. kr.

Sparikassin hevur í síni uppgerð av solvenstørvi avsett mótvegis kredittváða, ið kann føra til niðurskrivingar, um útlitini fyri hesum váða versna. Hesar niðurskrivingar vilja bert ávirka raksturin og harvið eginpeningin, men ikki solvensyvirdekningin hjá sparikassanum. Avsetingin verður mett at vera nøktandi. Víst verður annars til notu 30.

Grundað á gongdina í samfelagnum og nýggjum niðurskrivingarkrøvum til peningastovnar, metir sparikassin, at sannlíkindi eru fyri, at niðurskrivingar framvegis verða at síggja í roknskapunum komandi árini, men tó á einum lægri støði.

## Váðar og váðastýring

Tað áliggur nevnd sparikassans at syrgja fyri, at sparikassin hevur eina vælvirkandi váðastýring, soleiðis at allir týðandi váðar verða eyðmerktir, og at hóskandi skipanir eru til váðastýring. Harafturat skal váðapolitikkur og váðakarmar fastleggjast.

Váðaábyrgdarhavandi hevur vegna stjórn eftirlit við váðastýringini í sparikassanum. Uppgávan hjá váðaábyrgdarhavandi er at tryggja, at váðastýringin er nøktandi og at leiðslan hevur eina greiða mynd av samlaða váða sparikassans.

Sum partur av regluligu kunningini til nevndina, verður váðafrágreiðing viðvíkjandi teimum týðandi váðaøkjunum løgd fyri nevndina hvønn ársfjórðing. Harumframt verður váðafrágreiðing frá váðaábyrgdarhavandi løgd fyri nevndina einaferð um árið. Tað áliggur stjórnini og váðaábyrgdarhavandi at tryggja, at nøktandi innanhýsis mannagongdir eru í samband við máting og stýring av váða. Í sparikassanum er skilnaður ímillum eindirnar, sum avgreiða, og tær sum hava eftirlit.

Rakstur av peningastovnsvirksemi inniber, at sparikassin átekur sær nakrar serligar váðar, herundir kredittváðar, marknað-

arváðar, gjaldførisváðar og operatiónellar váðar. Hesum váðum, sum eru lýstir niðanfyri, sýnir sparikassin serligan ans í dagliga virki sínum, tí endamálið við sparikassans politikki er at avmarka tey tap, sum millum annað kunnu standast av óvæntaðari gongd á fíggjarmarknaðunum.

Tað kunnu verða aðrir váðar, umframt teir, sum verða lýstir her, sum kunnu hava ávirkan fyri framhaldandi rakstur og menning av sparikassanum, men leiðslan metir, at teir lýstu váðarnir, eru teir mest týðandi. Endamálið við hesum upplýsingum um váðar og váðastýring er at geva teimum, sum hava áhugamál í sparikassanum, betri møguleika at meta um váðaprofil og kapitaltørv sparikassans.

## Kredittváði

Kredittváði merkir, at vandi er fyri fíggjarligum tapi, tá kundin ikki er førur fyri at yvirhalda sínar fíggjarligu skyldir mótvegis sparikassanum.

Sparikassin leggur í sínum kredittpolitikki og í síni kredittstýring herðslu á, at hvørki einstøk tap ella fleiri samlað tap innan ávísar vinnugreinar skulu kunna gerast so stór, at hesi í síðsta enda kunnu hava álvarsligar fylgjur fyri solvensin. Tí arbeiðir sparikassin áhaldandi við at betra um bonitetin av kredittum og at avmarka kredittváðan, bæði sæð samlað og innan ávísar vinnugreinar. Við ársenda 2013 metir sparikassin, at kredittváðin er á einum nøktandi varisligum støði, sum er í samsvari við sparikassans kredittpolitikk.

Sambært galdandi kredittpolitikki kunnu vinnulán vera millum 30 og 45 % av samlaða kredittváða sparikassans burtursæð frá lánum til almennar myndugleikar. Ásett eru eisini ítøkilig mørk viðvíkjandi vinnugreinabýtinum.

Landafrøðiliga spjaðingin av útlánsvirksemi sparikassans er í dag soleiðis, at kundagrundarlagið fevnir í størstan mun um Norðoyggjar, Eysturoy og Suðurstreymoy - tað vil siga í teimum økjum, har sparikassin hevur sínar deildir.

Tá fíggjarkreppan byrjaði og inntil 2012 minkaði sparikassin miðvíst síni útlán, men við árslok 2012, varð mett at komið var á mál. Í 2013 hevði sparikassin ein lítlan útlánsvøkstur. Vanliga verður mett at stórur vøkstur viðførir at dygdin í kredittviðgerðini verður ikki nøktandi. Sparikassin metir at vøkstur upp á í mesta lagi 5 % er hóskandi fyri sparikassan. Tekin eru um spakuliga vaksandi eftirspurning eftir útlánum. Hóast sparikassin hevur nøktandi kapital og gjaldføri til vøkstur, ynskir sparikassin at avmarka vøksturin í 2014.

Ein bólkur av sínamillum samanhangandi kundum, verður roknaður sum eitt engagement, sambært galdandi kunngerð um stór engagement. Um engagementið eftir frádrátt er 10 % av basiskapitalinum, verður tað roknað sum eitt stórt engagement. Eftirlitsdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum ásetur, at summurin av stórum engagementum ikki skal fara upp um 125 % av basiskapitalinum. Grundað á basiskapital sparikassans pr. 31.12.2013, sum var kr. 212.385.363, verður eitt engagement roknað sum stórt engagement, um tað er kr. 21.238.536 ella størri. Summurin av stórum engagementum var 40,9 % av basiskapitali sparikassans svarandi til 86,9 mió. kr., sum er ein munandi minking í mun til eitt ár frammanundan, tá talið var 56,8 %. Tað er eisini munandi minni enn markið í eftirlitsdiamantinum. Sostatt hevur sparikassin nátt málinum, at summurin av stórum engagementum skal í mesta lagi vera 50 % av basiskapitalinum við árslok 2013.

## Kredittviðgerðin

Kredittdeildin hevur yvirskipaðu ábyrgdina av kredittveitingini og leiðslan ásannar, at kredittdeildin er ein sera týðandi partur í váðastýringini og kredittviðgerðini. Uppgávan hjá kredittdeildini er at hava eftirlit við kredittviðgerðini og játtanarmannagongdum í sparikassanum. Kredittdeildin er við í játtanini av størri millumverandi eins og í meira truplum málum. Harumframt skipar kredittdeildin fyri, at øll engagement verða gjøgnumgingin í minsta lagi einaferð árliga. Gjøgnumgongdin umfatar m.a. greining av gjaldsevni og fíggjarstøðu kundans. Sparikassin ásetur við støði í framdu greiningunum, karakter á hvørt einstakt engagement, samsvarandi karakterstiga Fíggjareftirlitisins. Karaktergevingin gevur leiðsluni eina mynd av

bonitetinum hjá kundum sparikassans sum heild, og tryggjar eyðmerking av veikum engagementum. Kredittdeildin skal somuleiðis tryggja, at málsetningar og ásetingar í kredittpolitikkinum verða fylgdar, herundir m.a., at neyðug orka er avsett til eina effektiva viðgerð av truplum engagementum. Hetta er fyri at avmarka tapsvandan. Regluligar kredittfrágreiðingar verða latnar nevnd sparikassans. Hetta er ætlað sum amboð hjá nevndini at eyðmerkja og stýra kredittváða sparikassans, sum umrøtt omanfyri.

Sparikassin metir í minsta lagi hvønn ársfjórðing um tørvin á niðurskriving av einstøkum útlánum og av niðurskriving upp á bólkar av útlánum við felags váðaeyðkennum. Somuleiðis verður hvønn ársfjórðing mett um tørvin at burturleggja upp á ábyrgdir. Bólkaniðurskrivingin verður roknað eftir myndli, sum er mentur av Lokale Pengeinstitutter, ið er ein felagsskapur av peningastovnum í Danmark og Føroyum, sum sparikassin er limur í.

### Marknaðarváði

Marknaðarváði er at rokna sum váðin fyri, at marknaðarvirðið av sparikassans aktivum og passivum ávirkast av broytingum í marknaðarviðurskiftum. Marknaðarváðin fevnir um rentu-, gjaldoyra- og partabrævaváða.

### Rentuváði

Rentuváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við rentubroytingar á fíggjarmarknaðunum. Upphæddin, sum upplýst er í roknskapinum sum rentuváði, er kurstap, sum sparikassin fær, um rentustøðið hækkar 1 %-stig.

Sparikassin hevur framvegis ein lágan rentuváða. Tann 31.12.2013 var rentuváðin 3,4 mió. kr. Hetta svarar til 1,9 % av basiskapitalinum.

### Partabrævaváði

Partabrævaváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í partabrævakursum.

Partabrævaíløgur fevna um børsskrásett partabrøv, óskrásett partabrøv og kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum. Sparikassin hevur eingi børsskrásett partabrøv ella kapitalpartar í tilknýttum og assosieraðum fyritøkum. Sparikassin eigur sostatt bert sektorpartabrøv, sum eru partabrøv í fyritøkum, sum sparikassin samstarvar við. Við ársenda 2013 var virðið av sektorpartabrøvum 13 mió. kr.

### Gjaldoyraváði

Gjaldoyraváði er váðin, sum sparikassin hevur í sambandi við broytingar í gjaldoyrakursum.

Sparikassin hevur gjaldoyraváða í sambandi við goymslu av kontantum gjaldoyra. Sparikassin hevur altíð eina hóskandi nøgd í ávísum gjaldoyrum í sambandi við kontantan handil við viðskiftafólk. Sparikassin hevur ikki aðra ogn ella skuld í fremmandum gjaldoyra.

Gjaldoyrastøða sparikassans, sum er upplýst undir lyklatølunum, var 0 tann 31.12.2013.

### Gjaldførisváði

Gjaldførisváði er váðin fyri, at sparikassin ikki er mentur at halda gjaldsskyldur sínar, um gjaldførið ikki er nøktandi.

Somuleiðis kann vandi vera fyri, at útvegan av gjaldføri gerst meira kostnaðarmikið, enn roknað verður við. Sparikassin leggur í stýringini av gjaldførisváðanum herðslu á, at tryggja eitt gott gjaldføri bæði í mun til stuttfreistaðar og langfreistaðar skyldur, og at fíggingarkostnaðurin er rímiligur.

Galdandi lóg ásetir minstukrøv til gjaldføri sparikassans og harafturat ásetur eftirlitsdiamanturin eitt mark, sum er 50 % størri

enn lógarkravið. Sparikassin ásetur sjálvur eitt innanhýsis krav til gjaldførið, sum er 100 % og harvið munandi hægri enn minstukrøvini sambært lógini og eftirlitsdiamantinum. Tann 31.12.2013 var yvirdekningurin í mun til minstakrav lógarinnar 188,2 %.

Sparikassin fylgir neyvt við gongdini í gjaldførinum, soleiðis at neyðug stig kunnu takast um óvæntaðar broytingar koma fyri. Sparikassin hevur eina ætlan við ítøkiligum tiltøkum, sum kunnu setast í verk, um gjaldførið fer niður um innanhýsis ásetta markið. Nevnd og stjórn fáa mánaðarliga uppgerð yvir gjaldførisstøðu sparikassans.

### Operatiónellur váði

Hetta er váði í sambandi við tap, sum kunnu koma beinleiðis ella óbeinleiðis av manglandi ella skeivum innanhýsis mannagongdum, menniskjaligum mistøkum, feilum í skipanum ella av uttanífrá komandi hendingum. Somuleiðis er váði í sambandi við umdømi sparikassans umfatað av operatiónella váðanum.

Sparikassin stýrir hesum váða við virkisgongdum og innanhýsis eftirliti. Virkisgongdirnar verða javnan endurskoðaðar og broyttar um neyðugt, umframt at nýggjar verða mentar eftir tørvi.

Sparikassin avsetur neyðuga orku til eftirlit, og verða eftirlitsuppgávurnar framdar av starvsfólki, sum fyriskipanarliga eru óheft av teimum, sum avgreiða.

# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 4 | Rentuinntøkur o.a. | 91.896 | 109.435 |
| 5 | Rentuútreiðslur o.a. | 25.857 | 38.683 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **66.039** | **70.752** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 57 | 57 |
| 6 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 7.197 | 6.477 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 457 | 1.497 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **72.836** | **75.789** |
| | | | |
| 7 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, partabrøvum, gjaldoyra o.ø. | 1.318 | -4.325 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 2.738 | 1.646 |
| 8 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 50.874 | 53.998 |
| 9 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 2.050 | 3.250 |
| 10 | Aðrar rakstrarútreiðslur | 3.620 | 2.554 |
| 11 | Avskrivingar og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 14.892 | 17.143 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **5.456** | **-3.835** |
| | | | |
| 12 | Skattur | 0 | 16.221 |
| | **Ársúrslit** | **5.456** | **-20.056** |

| | | |
|---|---|---|
| **Býti av ársúrsliti** | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 420 | 455 |
| Lagt í gávugrunnin | 150 | 0 |
| Flutt til næsta ár | 4.886 | -20.511 |
| **Íalt** | **5.456** | **-20.056** |

# Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 173.241 | 174.324 |
| 13 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 19.250 | 36.156 |
| 14 | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.485.519 | 1.480.416 |
| 15 | Lánsbrøv til dagsvirði | 0 | 10.299 |
| 15 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 164.023 | 195.404 |
| 16 | Partabrøv o.a. | 12.985 | 6.896 |
| 17 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 0 | 0 |
| 18 | Fastognir íalt | 36.395 | 36.400 |
| | Íløguognir | 22.710 | 22.710 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 13.685 | 13.690 |
| | Aðrar materiellar ognir | 9.883 | 9.407 |
| | Aktuell skattaáogn | 44 | 15 |
| 19 | Útsett skattaáogn | 0 | 0 |
| | Yvirtiknar ognir | 19.315 | 24.117 |
| 20 | Aðrar ognir | 4.283 | 5.633 |
| | Tíðaravmarkingar | 956 | 0 |
| | **Ogn tilsamans** | **1.925.894** | **1.979.067** |

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 21 | Skuld til peningastovnar | 256 | 102.498 |
| 22 | Innlán | 1.687.822 | 1.638.433 |
| | Onnur skuld | 22.195 | 28.834 |
| | Tíðaravmarkingar | 217 | 203 |
| | **Skuld tilsamans** | **1.710.490** | **1.769.968** |
| | | | |
| | **Avsetingar** | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.302 | 2.430 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 150 | 443 |
| | Aðrar avsetingar | 147 | 227 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.599** | **3.100** |
| | | | |
| 23 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | **51.285** | **50.943** |
| | | | |
| | **Eginpeningur** | | |
| 24 | Ábyrgdarpeningur | 8.182 | 6.795 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 147.805 | 168.316 |
| | Regulering renta av ábyrgdarpeningi undanfarið ár | 77 | 0 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 4.886 | -20.511 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 420 | 455 |
| | Gávugrunnur | 150 | 0 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **161.520** | **155.055** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **1.925.894** | **1.979.067** |

# Útgreining av eginpeningi

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.795 | 7.129 |
| | Tilgongd í árinum | 1.649 | 228 |
| | Frágongd í árinum | -262 | -562 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **8.182** | **6.795** |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 147.805 | 168.316 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 4.886 | -20.511 |
| | Regulering renta av ábyrgdarpeningi undanfarið ár | 77 | 0 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | **152.768** | **147.805** |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 420 | 455 |
| | Gávugrunnur | 150 | 0 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **161.520** | **155.055** |

# Yvirlit yvir notur


| Nota | | Síða |
|---|---|---|
| 1 | KAPITAL- OG SOLVENSUPPGERÐ | 20 |
| 2 | NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR | 21 |
| 3 | 5 ÁRA HØVUÐS- OG LYKLATØL | 28 |
| | NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN | |
| 4 | RENTUINNTØKUR | 29 |
| 5 | RENTUÚTREIÐSLUR | 29 |
| 6 | KOSTNAÐAR- OG PROVISJÓNSINNTØKUR | 29 |
| 7 | VIRÐISJAVNAN | 29 |
| 8 | ÚTREIÐSLUR TIL STARVSFÓLK OG FYRISITING | 29 |
| 9 | AV- OG NIÐURSKRIVINGAR AV ÍTØKILIGUM OGNUM | 30 |
| 10 | AÐRAR RAKSTRARÚTREIÐSLUR | 30 |
| 11 | NIÐURSKRIVINGAR UPP Á ÚTLÁN V.M. | 30 |
| 12 | SKATTUR | 32 |
| | NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA | |
| 13 | OGN HJÁ FÍGGJARSTOVNUM OG TJÓÐBANKUM | 32 |
| 14 | ÚTLÁN | 32 |
| 15 | LÁNSBRØV | 32 |
| 16 | PARTABRØV | 32 |
| 17 | KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM FYRITØKUM | 33 |
| 18 | ÍTØKILIGAR OGNIR | 33 |
| 19 | ÚTSETT SKATTAÁOGN | 33 |
| 20 | AÐRAR OGNIR | 34 |
| 21 | SKULD TIL PENINGASTOVNAR OG TJÓÐBANKAR | 34 |
| 22 | INNLÁN | 34 |
| 23 | EFTIRSTILLAÐ KAPITALINNSKOT | 34 |
| 24 | ÁBYRGDARPENINGUR | 35 |
| 25 | AÐRAR SKYLDIR UTTANFYRI JAVNAN | 35 |
| 26 | OGNIR SETTAR SUM TRYGD | 35 |
| 27 | OGNARVIÐURSKIFTI | 35 |
| 28 | NÆRSTANDANDI PARTAR | 35 |
| 29 | NEVND OG STJÓRN | 36 |
| | NOTUR UM AÐRAR UPPLÝSINGAR | |
| 30 | KREDITTVÁÐAR | 36 |
| 31 | MARKNAÐARVÁÐAR | 39 |
| 32 | RENTUVÁÐAR | 39 |

# Notur

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Kapital- og solvensuppgerð** | | |
| | Eginpeningur | 161.520 | 155.055 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | -420 | -455 |
| | Hybridur kjarnukapitalur | 25.785 | 50.943 |
| | **Kjarnukapitalur, aftaná frádrøg** | **186.885** | **205.543** |
| | | | |
| | Eginpeningur | 161.520 | 155.055 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | -420 | -455 |
| | Hybridur kjarnukapitalur | 25.785 | 50.943 |
| | Ábyrgdarlán | 25.500 | 0 |
| | **Basiskapitalur aftaná frádrøg** | **212.385** | **205.543** |
| | | | |
| | **Váðavektaðar ognir** | | |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 967.226 | 1.015.936 |
| | | | |
| | Vektað tøl við marknaðarváða | 644 | 867 |
| | Vektað tøl við operationellum váða | 130.827 | 124.523 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar | -6.119 | -5.589 |
| | **Vektað tøl tilsamans** | **1.092.578** | **1.135.737** |
| | | | |
| | Kapitalkrav sparikassans sambært grein 124, stk. 2 | 132.795 | 130.287 |
| | | | |
| | Solvensprosent | 19,4 % | 18,1 % |
| | | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 17,1 % | 18,1 % |

Nota

2 Nýttur roknskaparháttur

## Alment

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi o.a. umframt kunngerð um framløgu av fíggjarligum frágreiðingum hjá kredittstovnum v.m.

## Alment um ásetan og máting

Allar inntøkur verða roknaðar við í rakstrarroknskapin í mun til tað tíðarskeið, tær verða vunnar, og allar útreiðslur verða roknaðar við í tann mun, tær viðvíkja roknskaparárinum. Tó verða ávísir postar roknaðir beinleiðis umvegis eginognina, eftir at tann skattliga ávirkanin er ávikavist løgd afturat ella drigin frá.

Ogn verður roknað inn í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini koma sparikassanum tilgóðar, og ein meting av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða roknaðar við í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir í framtíðini ikki koma sparikassanum tilgóðar, og virðið av skylduni álítandi kann útroknast.

Keyp av fíggjarligum ognum verða roknað við í fíggjarstøðuna avrokningardagin. Somuleiðis verður hildið uppat við at rokna seldar fíggjarligar ognir við í fíggjarstøðuna avrokningardagin.

Hildið verður uppat at rokna fíggjarligar skyldur við í javnan, tá skyldan er hildin uppat gjøgnum uppfyllan, ella við at hon er sett ella farin úr gildi.

Við áseting og uppgerð av ognum og skyldum verður tikið atlit at upplýsingum, ið koma til okkara kunnleika eftir uppgerðardagin, og inntil vit gera ársfrásøgnina, um so er, at hesar upplýsingar staðfesta ella avnokta tey viðurskifti, ið eru komin fyri í seinasta lagi á uppgerðardegnum.

Tá ognir ella skyldur verða ásettar í fíggjarstøðuna á fyrsta sinni, verður hetta gjørt til dagsvirði. Tó verða fastar ognir ásettar til keypsprís, fyrstu ferð tær verða innsettar í fíggjarstøðuna.

Aftaná hetta verða ognir og skyldur uppgjørdar sum ásett fyri hvønn roknskaparpost sær niðanfyri. Keyp og søla av fíggjarligum ognum verða roknaðar við á avrokningardegnum.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða ásettar til amortiseraðan útveganarkostnað, soleiðis at tær verða roknaðar við einari støðugari effektivari rentu alt avtalutíðarskeiðið. Amortiserað útveganarvirði verður gjørt upp sum upprunaligt útveganarvirði við frádrátti av møguligum avdráttum og við ískoyti/frádráttum av allari amortiseringini av muninum millum útveganarkostnað og áljóðandi upphædd.

## Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virðið av ávísum ognum og skyldum eru fevnd av metingum um, hvussu hendingar í framtíðini kunna ávirka virði av hesum ognum og skyldum.

Tey øki, har roknskaparligar metingar hava størst ávirkan á roknskapin, eru fylgjandi:

- Niðurskrivingar upp á útlán
- Dagsvirði av føstum ognum
- Útsett skattaáogn

Tær metingar, ið eru gjørdar, eru við grundarlagi í fyritreytum, sum leiðslan metir vera forsvarligar, men sum eru ótryggar.

Harumframt er sparikassin ávirkaður av váðum og ótryggleikum, ið kunnu føra við sær, at tey uppgjørdu úrslitini kunnu víkja frá metingunum.

### Niðurskrivingar upp á útlán

Niðurskrivingar upp á útlán verða gjørdar við at taka atlit at virðislækking á útlánum. Niðurskrivingar verða gjørdar sum ein samanseting av stakum niðurskrivingum og niðurskrivingum upp á bólkar, og eru fevndar av fleiri metingum, eitt nú fyri hvørji útlán ella bólkar av útlánum, er staðfest objektiv ábending um virðislækking, metingar um framtíðar gjaldingar og áseting av virði av veittum trygdum.

Tá talan er um niðurskrivingar upp á útlán og annan ágóða, eru týðandi metingar gjørdar í samband við ásetan av váðanum fyri, at ikki allar ásettar framtíðar gjaldingar verða móttiknar.

### Dagsvirði av føstum ognum

Tá dagsvirði av ognum til egna nýtslu og íløguognum verður ásett, er hetta knýtt at roknskaparligum metingum, íroknað tað, ið sparikassin metir, at ognirnar væntast at kasta av sær og krøv til avkastprosent, ið sett verða til ognirnar.

### Útsett skattaáogn

Framførd skattlig hall verða tikin við í uppgerðina av útsettari skattaáogn í tann mun, tað er sannlíkt, at tað verður roknað við, at tað í framtíðini væntast at verða ein skattskyldug inntøka til ráðs, har framførda hallið kann gagnnýtast.

### Samtaksroknskapur

Sparikassin eigur einki dóttirfelag, og ger tí ikki samtaksroknskap.

Fyritøkur, ið ikki verða stýrdar av sparikassanum, ella har sparikassin ikki útinnir avgerandi ávirkan, verða mettar sum assosieraðar fyritøkur.

### Útlendskt gjaldoyra

Ágóði, skyldur og aðrir gjaldoyraligir postar í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru avroknað uppgerðardagin, verða umroknað við tí endakursi, sum er galdandi fyri viðkomandi gjaldoyra uppgerðardagin. Gjaldoyramunir, ið standast millum kursin handilsdagin, gjaldsdagin, og uppgerðardagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum 'Virðisjavnan'.

### Mótrokning

Áogn og skyldur verða bert mótroknaðar, um løgfrøðisligur rættur er til staðar at mótrokna upphæddir, og um tað er ætlanin at nettoavrokna ella realisera ognina og innfría skyldina samstundis.

## Rakstrarroknskapurin

### Rentur, kostnaður og provisjónir

Rentuinntøkur og rentuútreiðslur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin í tí tíðarskeiðinum, sum tær viðvíkja. Provisjónir og kostnaðarinntøkur, sum eru partar av effektivu rentuni av einum útláni, verða innroknaðar sum ein partur av amortiseraða kostprísinum og verða harvið inntøkuførdar yvir alt afturgjaldingarskeiðið á útláninum.

Rentuinntøkur av niðurskrivaðum parti av útláni verða førdar undir roknskaparpostinum niðurskrivingar upp á útlán og áognir v.m.

### Vinningsbýti av partabrøvum

Vinningsbýti av partabrøvum verður innroknað í rakstrarroknskapin, um sparikassin hevur rætt til at taka ímóti vinningsbýtinum. Hetta verður vanliga gjørt, tá vinningsbýtið er samtykt á umboðsráðsfundi felagsins.

### Virðisjavnan

Virðisjavnan umfatar realiserað og órealiserað virðisjavnan av fíggjarognum og øðrum avleiddum fíggjaramboðum og virðisjavnan av dagsvirði av íløgum í fasta ogn.

### Aðrar rakstrarútreiðslur

Aðrar rakstrarútreiðslur umfata útreiðslur, sum ikki roknast uppí aðrar postar í rakstrarroknskapinum, herundir gjald viðvíkjandi Innskjótaratrygdargrunninum og uppskriving av eftirstillaðum kapitalinnskotið.

### Niðurskrivingar upp á útlán og áogn v.m.

Niðurskrivingar upp á útlán og áogn v.m. inniheldur niðurskrivingar upp á útlán, áogn hjá peningastovnum og tjóðbankum og aðra áogn, sum kann hava við sær kredittváða. Eisini umfatað er burturlegging upp á ábyrgdir og óbrúktar kredittir og seinni virðisjavnan av hesum postum. Niðurskriving upp á ábyrgdir verður bókað sum burturlegging móti tapi upp á ábyrgdir. Niðurskriving upp á óbrúktar kredittir verður bókað sum aðrar burturlagdar skyldur.

### Skattur

Skattur í árinum umfatar ársins aktuella skatt og broyting í útsettum skatti. Skattur verður í rakstrarroknskapinum bókað við tí partinum, sum stavar frá ársúrslitinum og beinleiðis á eginkapitalin við tí partinum, sum stavar frá bókingum beinleiðis á eginognina.

## Fíggjarstøða

### Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum

Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum umfatar goymslu av peningaseðlum og myntum í øllum gjaldoyrum og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum.

### Áogn í peningastovnum og tjóðbankum

Áogn í peningastovnum og tjóðbankum umfatar áogn í peningastovnum og tíðarinnskot í tjóðbankum. Roknskaparposturin verður uppgjørdur sum amortiseraður kostprísur, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

### Útlán og aðrar áognir

Útlán og aðrar áognir verða uppgjørdar sum amortiseraður kostprísur frádrigið móttiknar kostnaðir og stovningarprovisjónir, har lagt er afturat munandi transaktiónskostnaðir, sum eru partur av effektivu rentuni á láninum.

Útlán og aðrar áognir verða javnan kannað fyri niðurskrivingartørv út frá fastløgdum objektivum ábendingum um virðisminking, partvíst einsæris fyri øll signifikant útlán og lán, sum ikki hóska í ein bólk, og partvíst sum bólkar av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Niðurskrivað verður við muninum millum roknskaparliga virðið áðrenn niðurskrivingar og nútíðarvirðið av væntaðu framtíðar gjaldsstreyminum av útláninum.

Ein objektiv ábending um virðisminking verður roknað at vera til staðar, um ein ella fleiri av hesum hendingum fyriliggja:

- Lántakarin er í fíggjarligum trupulleikum
- Lántakarin heldur ikki treytirnar í lánsavtaluni
- Treytirnar í lánsavtaluni vera gjørdar linari vegna lántakarans fíggjarligu trupulleikar
- ella tað er sannlíkt, at lántakarin fer í konkurs ella verður umfataður av aðrari fíggjarligari endurreisn

Fyri útlán og ágóðar, sum ikki eru niðurskrivað einsæris, metir sparikassin fyri hvønn bólk av útlánum, hvørt talan er um objektiva ábending um virðisminking.

Sparikassin metir um niðurskrivingartørv av bólkum av útlánum, sum hava felags eyðkenni viðvíkjandi kredittváða. Sparikassin bólkar útlánini í 3 bólkar, ein fyri privatkundar og tveir fyri vinnukundar.

Metingin av bólkunum verður gjørd eftir einum segmenteringsmyndli, sum er mentur av Felagnum fyri Lokalar Pengastovnar, sum eisini stendur fyri viðlíkahaldi og framhaldandi menning av myndlinum. Myndilin fastleggur samanhangin i ymsu bólkunum millum staðfest tap og nakrar signifikantar forklárandi landsbúskaparligar variablar við eini linju regressiónsgreining. Sum variablar verður m.a. brúkt arbeiðsloysi, húsaprísir, renta, tal av konkursum/tvingsilssølum v.m.

Segmenteringsmyndilin er í útgangsstøðinum útroknaður grundað á tapsupplýsingar fyri allan peningastovnsgeiran. Sparikassin skal tí meta, um tilpassast skal til egin viðurskifti, soleiðis at tað eru hesi tilpassaðu estimatini, sum verða brúkt í útrokningini av niðurskriving upp á bólkar. Fyri hvønn bólk av útlánum og ágóðum fæst eitt estimat, sum sigur, hvussu stór virðisminkingin er í prosent av einum bólki á fíggjarstøðudagfestingini. Við at samanbera upprunaliga tapsváðan fyri einstaka útlánið við tapsváðan við endan á aktuella roknskaparskeiðnum, framkemur upphæddin frá einstaka útláninum til niðurskrivingarnar fyri bólkar.

## Leasing

Norðoya Sparikassi hevur hvørki leasingogn ella skyldur.

## Fíggjarlig ogn (lánsbrøv og partabrøv)

Fíggjarlig ogn sum t.d. lánsbrøv, partabrøv og aðrir kapitalpartar verða bókaðir til dagsvirði.

Fyri virðisbrøv, sum eru skrásett á keypsskála, verður dagsvirðið ásett eftir alment noteraða kursinum við afturlating á fíggjarstøðudagfestingini, um ikki hesin kursur roknast fyri at vera misvísandi fyri veruliga dagsvirðið.

Í øllum øðrum førum verður dagsvirðið ásett eftir alment gókendum virðisásetingarháttum, sum hava til endamáls at áseta transaktiónsprísin, sum hevði verið við handli á uppgerðardegnum millum óvildugar partar, sum handla eftir vanligum handilsligum fortreytum.

Tá virðið verður mált, verður hædd tikin fyri øllum kendum marknaðarupplýsingum, sum kunnu metast at hava ávirkan á dagsvirðið, og sum luttakarar á marknaðinum væntast at taka við í prísásetingini av viðkomandi fíggjaramboði.

Um so er, at álítandi dagsvirði ikki kann ásetast fyri ónoteraðar kapitalpartar, verður virðið sett til kostprís.

## Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís

Íløgur sum sparikassin hevur heilt til gjalddagin, eru skrásettar á einum virknum marknaði, og eru keyptar við tí fyri eyga, at fáa vinning í tíðarskeiðinum fram til gjalddagin. Hesar íløgur, sum sparikassin hevur til gjalddagin, verða í fyrstu syftu roknaðar til dagsvirði, sum er kostprísur, umframt kostnaður ið beinleiðis kemur av keypinum. Í aðru syftu verða lánsbrøvini roknað til amortiseraðan kostprís og kunnu víkja frá dagvirði.

## Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum

Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum verða roknaðir eftir innara virði.

Úrslitapartar eftir skatt og eliminering verður tikið við í rakstrarroknskapin.

## Íløguognir

Íløguognir umfata fastar ognir, sum sparikassin eigur, við tí endamáli at fáa leiguinntøkur og/ella kapitalvinning frá sølu.

Íløguognir verða settar til dagsvirði.

Dagsvirði fyri íløguognir verður sum høvuðsregla uppgjørt við støði í væntaða avkastinum av ognini eftir einum avkastprosenti, sum er einsæris ásett fyri ognina. Avkastprosentið er treytað av, hvar ognin liggur, slag av ogn, nýtslumøguleikum, innrætting og treytum í leigusáttmálum.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Virðisjavnan verður bókað yvir rakstrarroknskapin í roknskaparpostinum kursjavnan.

## Fastognir til egna nýtslu (domicilognir)

Fastognir til egna nýtslu (domicilognir) eru ognir, sum sparikassin brúkar til egnan rakstur sum fyrisiting, deild ella aðrar tænastur. Ognin verður roknað sum domicilogn, um meginparturin av samlaðu gólvvíddini verður brúktur til sparikassans egna rakstur.

Domicilognir skulu í fyrsta umfari ásetast til kostprís og í aðru atløgu ásetast til endurmett virði, sum er dagsvirði á metingardagfestingini frádrigið eftirfylgjandi av- og niðurskrivingar.

Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Dagsvirðið verður ásett við støði í væntaða avkastinum og einum einsæris ásettum avkastprosenti.

Fyri smærri ognir, sum regluliga verða handlaðar til almannakunngjørdar prísir, verður dagsvirðið ásett við støði í hesum prísum.

Endurmetingar verða gjørdar soleiðis, at roknskaparliga virðið ikki víkir munandi frá dagsvirðinum á dagfestingini fyri fíggjarstøðuna.

Avskrivingar fyri domicilognir verða roknaðar eftir linjuháttinum yvir væntaðu nýtslutíðina við støði í endurmetta virðinum. Væntaða nýtslutíðin er 50 ár, svarandi til 2 % p.a. Grundstykkir verða ikki avskrivað.

Hækkingar í endurmetta virðinum á domicilognum verður beinleiðis ført yvir eginkapitalin, uttan so at hækkingin svarar til eina lækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin.

Fall í endurmetta virðinum á eini domicilogn verður tikið við í rakstrarroknskapin, uttan so at fallið svarar til eina hækking, sum áður er tikin við í rakstrarroknskapin. Í slíkum førum verður virðisfallið ført beinleiðis yvir eginkapitalin.

## Aðrar materiellar ognir

Aðrar materiellar ognir verða settar til kostprís frádrigið akkumuleraðar av- og niðurskrivingar. Kostprísurin umfatar útveganarvirðið og kostnaðin, sum beinleiðis stavar frá útvegan, inntil ognin var klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður eftir linjuháttinum yvir væntaða nýtslutíð fyri ognina upp á millum 3 og 8 ár.

## Ognir, ið eru fyribils ogn

Ognir, ið eru fyribils ogn, umfata ognir, sum eru yvirtiknar frá kundamillumverandi, sum bert er ogn sparikassans fyribils, og har søla væntast innan stutta tíð, og har søla er sera sannlík.

Materiell støðisogn, sum er fyribils ogn, verður bókað til lægra virðið av roknskaparliga virðinum og dagsvirðinum frádrigið sølukostnað.

## Onnur ogn

Onnur ogn umfatar ognir, sum ikki kunnu setast undir aðrar ognarpostar. Posturin umfatar mest áogn av rentum og provisjónum og positivt marknaðarvirði av avleiddum fíggjaramboðum.

Avleidd fíggjaramboð verða roknað til dagsvirði, ímeðan aðrir postar verða roknaðir til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Tíðaravmarkingar
Tíðaravmarkingar undir ogn umfata goldnar kostnaðir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum.

Tíðaravmarkingar undir skuld umfata móttiknar provisjónir, sum viðvíkja seinni roknskaparárum. Tíðaravmarkingar verða roknaðar til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Útgivin lánsbrøv
Útgivin lánsbrøv verða í fyrstu syftu innroknað til netto lánsupphæddina, eftir at kostnaður er trektur frá. Í aðru syftu verða tey roknað til amortiseraðan kostprís. Munurin ímillum netto lánsupphæddina og nominella virðið, verður tikið við í raksturin sum rentuútreiðslur yvir lánitíðina.

## Eftirsett kapitalinnskot
Eftirsett kapitalinnskot verður tikið við, tá skyldan er átikin og roknað sum móttikin upphædd, frádrigið kostnaðir í hesum sambandi og við væntaðu uppskrivingini lagt afturat.

Í seinni tíðarskeiðum verður eftirstillað kapitalinnskot roknað til amortiseraðan kostprís, svarandi til kapitaliseraða virðið roknað við grundarlagi í effektivu rentuni.

## Onnur skuld og onnur fíggjarlig ábyrgd
Onnur skuld fevnir serliga um skyldugar rentur og provisjónir, kostnaðir og negativt marknaðarvirði av avleiddum fíggjarligum tólum.

Avleidd fíggjarlig tól setast til dagsvirði, ímeðan aðrir postar setast til amortiseraðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði.

## Skattur
Aktuellar skattaskyldur og aktuell áogn av skatti verða í fíggjarstøðuni bókað sum roknaður skattur av ársins skattskyldugu inntøku, javnað fyri skatt av skattligum úrsliti frá undanfarnum árum. Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í tíðarfráviki ímillum roknskaparlig og skattlig virði av ognum og skyldum.

Útsettur skattur verður roknaður við grundarlagi í skattareglum og skattaásetingum, sum eru galdandi á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni.

Útsett skattaáogn verður roknað sum tann upphæddin, sum verður brúkt, til dømis við javnan av skatti av framtíðar vinningi, ella við mótrokning í útsettum skattskyldum innan somu løgfrøðisligu skattaeind.

## Avsetingar til útreiðslur
Starvsfólkaskyldur, ábyrgdir og aðrar skyldur, har stødd ella gjaldsfreist eru ókend, verður tikið við, tá tað á dagfestingini fyri fíggjarstøðuni er sannlíkt, at skyldan fer at kosta sparikassanum pening, og at upphæddin fyri skylduna kann gerast upp álítandi.

Skyldur roknast eftir bestu meting yvir teir kostnaðir, sum eru neyðugir fyri at innfría skyldina. Við útrokning av avsettum skyldum verður afturdiskontering gjørd, um tað hevur týdning.

## Innskjótaratrygdargrunnurin
Gjaldið til grunnin verður tikið við í rakstrarroknskapin undir aðrar rakstrarútreiðslur. Sparikassans skyldur umframt tann goldnað upphæddin er ein avsett skylda.

## Avleidd fíggjarlig tól
Avleidd fíggjarlig tól verða í fyrsta umfari tikin við í fíggjarstøðuna til kostprís og í øðrum umfari til dagsvirði. Positiv og negativ

dagsvirði av avleiddum fíggjarligum tólum innganga undir aðrar ognir, ávikavist aðrar skyldur. Dagsvirðið av avleiddum fíggjarligum tólum verður uppgjørt við støði í marknaðarupplýsingum.

Broyting í dagsvirðinum av avleiddum fíggjarligum tólum, sum ikki hava støðu sum tryggingaramboð, verða tikin við undir virðisjavnan.

### Segmentupplýsingar

Av tí at virksemið og marknaðirnir ikki víkja frá innanhýsis, er í roknskapinum ikki upplýst um, hvussu netto rentu- og kostnaðarinntøkur og virðisjavnan er býtt upp á virkisøkir og á landafrøðiligar marknaðir.

## Nota

3 5 ára-yvirlit

| Lyklatøl | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 19,4 | 18,1 | 16,4 | 14,8 | 16,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 17,1 | 18,1 | 16,4 | 14,8 | 16,1 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 3,4 | -2,2 | -0,9 | -28,1 | -18,3 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 3,4 | -11,6 | -0,9 | -28,1 | -15,2 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,08 | 0,96 | 0,98 | 0,53 | 0,56 |
| Rentuváði | 1,9 | 3,6 | 2,8 | 2,5 | 2,0 |
| Gjaldoyrastøða | 0,3 | 0,4 | 0,3 | 0,3 | 0,0 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 91,0 | 93,9 | 107,0 | 113,6 | 100,2 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 188,2 | 172,7 | 128,3 | 218,0 | 102,4 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til basiskapital | 40,9 | 56,8 | 91,7 | 101,2 | 85,1 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 3,0 | 4,0 | 3,2 | 2,4 | 2,2 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 3,2 | 3,7 | 3,7 | 5,8 | 3,1 |
| Taps- og niðurskrivingarprosent í árinum | 0,8 | 1,1 | 0,7 | 2,7 | 2,1 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 0,3 | -8,8 | -4,6 | -7,4 | -1,1 |
| Útlán í mun til eginpening | 9,2 | 9,6 | 9,2 | 9,6 | 7,8 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 72.836 | 75.789 | 72.320 | 76.953 | 67.615 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 2.738 | 1.646 | 548 | 785 | 1.707 |
| **Vanligar inntøkur íalt** | **75.574** | **77.435** | **72.868** | **77.738** | **69.322** |
| | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 50.874 | 53.998 | 57.235 | 63.564 | 51.443 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 2.050 | 3.250 | 3.491 | 3.986 | 4.571 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | 3.620 | 2.554 | 0 | 5.205 | 7.294 |
| **Vanligar útreiðslur íalt** | **56.544** | **59.802** | **60.726** | **72.755** | **63.308** |
| | | | | | |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **19.030** | **17.633** | **12.142** | **4.983** | **6.014** |
| | | | | | |
| Virðisjavnan | 1.318 | -4.325 | -2.381 | -13.421 | -7.905 |
| Tap og niðurskrivingar, skuldarar | 14.892 | 17.143 | 11.323 | 49.306 | 46.341 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 0 | 0 | -88 | 485 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **5.456** | **-3.835** | **-1.562** | **-57.832** | **-47.747** |
| | | | | | |
| Skattur | 0 | 16.221 | 0 | 0 | -8.156 |
| **Ársúrslit** | **5.456** | **-20.056** | **-1.562** | **-57.832** | **-39.591** |
| | | | | | |
| Útreiðslustig[1] (%) | 74,8 | 77,2 | 83,3 | 93,6 | 91,2 |
| Úrslit í mun til útlán og ábyrgdir[2] (%) | 1,25 | 1,11 | 0,71 | 0,28 | 0,31 |
| | | | | | |
| Fíggjarstøða | | | | | |
| Útlán | 1.485.519 | 1.480.416 | 1.623.652 | 1.702.258 | 1.837.592 |
| Virðisbrøv | 177.008 | 221.599 | 264.862 | 352.096 | 245.083 |
| Innlán | 1.687.822 | 1.638.433 | 1.585.004 | 1.580.707 | 1.892.799 |
| Javni | 1.925.894 | 1.979.067 | 2.184.545 | 2.493.076 | 2.266.384 |
| Eginpeningur | 161.520 | 155.055 | 175.445 | 176.761 | 234.720 |
| Basiskapitalur | 212.385 | 205.543 | 209.604 | 210.653 | 268.332 |
| Ábyrgdir | 38.251 | 42.850 | 44.549 | 35.806 | 34.828 |

Samanberingstøl eru ikki tillagað broytingum í nýttum roknskaparhátti fyri 2009 - 2010.
[1] Vanligar rakstrarútreiðslur íalt í prosent av vanligum inntøkum íalt.
[2] Úrslit av vanligum rakstri í prosent av miðal útlánum og ábyrgdum umroknað til heilár.

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 4 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 40 | 266 |
| | Útlán | 90.094 | 106.617 |
| | Lánsbrøv | 1.762 | 2.552 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **91.896** | **109.435** |
| 5 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 154 | 526 |
| | Innlán | 19.532 | 27.243 |
| | Útgivin lánsbrøv | 0 | 3.206 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 5.407 | 5.647 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 764 | 2.061 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **25.857** | **38.683** |
| 6 | **Kostnaðar- og provisjónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 38 | 47 |
| | Gjaldstænastur | 2.144 | 1.805 |
| | Lánisakskostnaður | 1.876 | 1.909 |
| | Provisjón av ábyrgdum | 786 | 751 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisjónsinntøkur | 2.353 | 1.965 |
| | **Tilsamans** | **7.197** | **6.477** |
| 7 | **Virðisjavnan** | | |
| | Útgivin lánsbrøv | 0 | -662 |
| | Lánsbrøv | -93 | -41 |
| | Partabrøv | -560 | -1.509 |
| | Íløguognir | 0 | -204 |
| | Gjaldoyra | -33 | 37 |
| | Fíggjarlig tól | 2.004 | -1.946 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **1.318** | **-4.325** |
| 8 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 1.851 | 1.947 |
| | Nevnd | 811 | 810 |
| | Umboðsráð | 135 | 158 |
| | **Tilsamans** | **2.797** | **2.915** |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 18.989 | 21.401 |
| | Eftirløn | 3.132 | 3.375 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 3.329 | 3.106 |
| | **Tilsamans** | **25.450** | **27.882** |

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 8 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting (framhald)** | | |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 22.627 | 23.201 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **50.874** | **53.998** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 45,1 | 46,2 |

Sparikassin hevur ikki í roknskaparárinum veitt avriksløn ella bonus, hvørki til nevnd, stjórn ella starvsfólk. Sparikassin hevur heldur ikki undanfarin ár veitt avriksløn ella bonus, og hevur ongar ætlanir um framyvir at gera tað.

Sparikassin hevur, umframt stjórn, útnevnt ein týðandi váðatakara, hvørs løn og samsýning ikki verður upplýst sambært kunngerð um lønarpolitikk v.m. § 15, stk. 2.

Vísandi til lóg um statsligt innskot í fíggjarstovnar § 8, stk. 9 hevur sparikassin í útroknan og uppgerð av skattskyldugu inntøkuni bert frádrigið helmingin av samsýningini til stjórnina, ella tkr. 926. Stjórin kann av Norðoya Sparikassa uppsigast við 12 mánaðar freist og kann sjálvur siga upp við 3 mánaðar freist.

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Útreiðslur til grannskoðan** | | |
| | Samlað samsýning til tey umboðsráðsvaldu grann-skoðaravirkini, ið fremja lógarkravdu grannskoðanina | 1.166 | 1.544 |
| | Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 397 | 597 |

Norðoya Sparikassi hevur ikki innanhýsis grannskoðan.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 9 | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 216 | 788 |
| | Maskinur og innbúgv | 1.834 | 2.462 |
| | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **2.050** | **3.250** |
| 10 | **Aðrar rakstrarútreiðslur** | | |
| | Gjald til Innskjótaratrygdargrunnin | 3.278 | 2.202 |
| | Uppskriving eftirstillað kapitalinnskot | 342 | 352 |
| | **Aðrar rakstrarútreiðslur tilsamans** | **3.620** | **2.554** |
| 11 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m.** | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 53.154 | 59.287 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán í árinum | 22.029 | 24.395 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -10.620 | -12.297 |
| | Avskrivingar (staðfest tap) | -21.653 | -18.231 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar upp á útlán við ársenda** | **42.910** | **53.154** |

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 11 | **Niðurskrivingar upp á útlán v.m. (framhald)** | | |
| | Niðurskrivað útlán í alt, áðrenn niðurskrivingar | 134.895 | 163.099 |
| | Individuellar niðurskrivingar íalt | -42.910 | -53.154 |
| | **Niðurskrivað útlán íalt, eftir niðurskrivingar** | **91.985** | **109.945** |
| | | | |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 5.589 | 4.814 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán í árinum | 1.910 | 2.023 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -1.381 | -1.248 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar upp á útlán við ársenda** | **6.118** | **5.589** |
| | | | |
| | Niðurskrivað útlán í alt, áðrenn niðurskrivingar | 1.166.435 | 1.251.762 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar íalt | -6.118 | -5.589 |
| | **Niðurskrivað útlán íalt, eftir niðurskrivingar** | **1.160.317** | **1.246.173** |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **49.028** | **58.743** |
| | | | |
| | **Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir** | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 443 | 0 |
| | Burturleggingar í árinum | 50 | 443 |
| | Afturførdar burturleggingar | -343 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársenda** | **150** | **443** |
| | | | |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **49.178** | **59.186** |
| | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | |
| | Individuellar niðurskrivingar upp á útlán netto | 11.408 | 12.098 |
| | Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir netto | 293 | 443 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | 529 | 774 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -1.664 | -2.640 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivað | 3.651 | 2.842 |
| | Inngoldið til áður avskrivað krøv | -400 | -372 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 1.661 | 3.998 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin í árinum** | **14.892** | **17.143** |

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | **Skattur** | | |
| | Broyting av útsettum skatti | 0 | -16.215 |
| | Goldin skattur | 0 | -6 |
| | **Tilsamans** | **0** | **-16.221** |
| 13 | **Ogn hjá fíggjarstovnum og tjóðbankum** | | |
| | Uttan uppsøgn | 19.250 | 36.156 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 0 | 0 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **19.250** | **36.156** |
| 14 | **Útlán** | | |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 26.704 | 38.459 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 108.564 | 88.933 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 439.933 | 398.133 |
| | Yvir 5 ár | 910.317 | 954.891 |
| | **Útlán tilsamans** | **1.485.519** | **1.480.416** |
| 15 | **Lánsbrøv** | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagsvirði | 0 | 10.299 |
| | Skrásett á keypsskálum - amortiserað kostprís | 164.023 | 195.404 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **164.023** | **205.703** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | 1.638 | -2.721 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **165.661** | **202.982** |
| 16 | **Partabrøv** | | |
| | Onnur partabrøv | 12.985 | 6.896 |
| | **Partabrøv tilsamans** | **12.985** | **6.896** |
| 17 | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | Samlaður keypsprísur við ársbyrjan | 2.461 | 2.461 |
| | Frágongd | -2.461 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **0** | **2.461** |
| | Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársbyrjan | -2.461 | -1.453 |
| | Upp- og niðurskrivingar í árinum | 0 | -1.008 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | 2.461 | 0 |
| | **Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársenda** | **0** | **-2.461** |
| | **Bókað virði við ársenda** | **0** | **0** |

Sp/f KÍ-høllin, fastognarfelag, varð avtikið í skiftirættinum tann 6. november 2013.

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 18 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | Íløguognir | | |
| | Dagsvirði við ársbyrjan | 22.710 | 21.644 |
| | Tilgongd | 0 | 1.270 |
| | Aðrar broytingar í árinum | 0 | -204 |
| | **Dagsvirði við ársenda** | **22.710** | **22.710** |
| | **Ognir til egnu nýtslu** | | |
| | Útveganarvirði við ársbyrjan | 13.690 | 18.922 |
| | Tilgongd | 211 | 555 |
| | Frágongd | 0 | -5.000 |
| | Av- og niðurskrivingar í árinum | -216 | -210 |
| | Broytingar til endurmett virði | 0 | -577 |
| | **Útveganarvirði við ársenda** | **13.685** | **13.690** |
| | **Bókað virði av føstum ognum við ársenda** | **36.395** | **36.400** |
| | Virðisáseting er gjørd av innanhýsis metingarfólki | | |
| | **Maskinur, innbúgv o.a.** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 41.352 | 41.452 |
| | Tilgongd | 2.311 | 0 |
| | Frágongd | 0 | -100 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **43.663** | **41.352** |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 31.945 | 29.483 |
| | Avskrivingar í árinum | 1.834 | 2.462 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **33.779** | **31.945** |
| | **Bókað virði av maskinum, innbúgv o.a. við ársenda** | **9.884** | **9.407** |
| 19 | **Útsett skáttaágn** | | |
| | Útsett skattaáogn við ársbyrjan | 0 | 16.215 |
| | Broyting í útsettari skattaáogn í árinum | 0 | -16.215 |
| | **Útsett skattaáogn við ársenda** | **0** | **0** |
| | Samlað hall | 165.528 | 170.984 |
| | Roknaður skattur | 18 % | 18 % |
| | Roknaður skattur av halli | 29.795 | 30.777 |
| | Niðurskriving av skattaáogn | -29.795 | -30.777 |
| | **Útsett skattaáogn íalt** | **0** | **0** |

Tá virðið á útsettu skattaáognini er treytað av gongdini framyvir, er ein ávís óvissa knýtt at áognini, av tí at óvæntað viðurskifti kunnu ávirka væntanir hjá leiðsluni til framtíðar rakstur. Sum avleiðing av hesum og grundað í øktum krøvum um skjalprógv um framtíðarrakstur, er skattaáognin ikki roknað í roknskapinum.

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 20 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 3.023 | 3.670 |
| | Aðrar ognir | 1.260 | 1.963 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **4.283** | **5.633** |
| | | | |
| 21 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | Skuld til tjóðbankar | 0 | 100.493 |
| | Skuld til peningastovnar | 256 | 2.005 |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar tilsamans** | **256** | **102.498** |
| | | | |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Uttan uppsøgn | 256 | 0 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 0 | 102.498 |
| | | | |
| 22 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 815.864 | 853.425 |
| | Við uppsøgn | 663.456 | 853.425 |
| | Tíðarinnskot | 58.726 | 81.577 |
| | Serinnlán | 149.776 | 142.577 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.687.822** | **1.638.433** |
| | | | |
| | **Innlán eftir avtalutíðarskeiði** | | |
| | Uttan uppsøgn | 819.662 | 874.760 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 83.795 | 111.982 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 415.776 | 345.622 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 192.422 | 141.114 |
| | Yvir 5 ár | 176.167 | 164.955 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.687.822** | **1.638.433** |
| | | | |
| 23 | **Eftirstillað kapitalinnskot** | | |
| | Hybridur kjarnukapitalur við ársbyrjan | 50.943 | 50.591 |
| | Eyka avdráttur í 2013 | -25.500 | 0 |
| | Uppskriving | 342 | 352 |
| | **Hybridur kjarnukapitalur við ársenda** | **25.785** | **50.943** |
| | | | |
| | Tilgongd í árinum: | | |
| | Ábyrgdarlán | 25.500 | 0 |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot tilsamans** | **51.285** | **50.943** |

51.285 tkr. verða taldar upp í basiskapitalin tann 31. desember 2013.

Hybridur kjarnukapitalur er veittur av danska statinum í DKK og eftir teimum almennu treytunum sum eru galdandi fyri hybridan kjarnukapital, sum er veittur av danska statinum. Lánið verður rentað við 10,7321 % við møguleika fyri skiftandi rentuískoyti. Lánið kann, fram til 9. september 2014, afturgjaldast til kurs pari, frá 10. september 2014 til 9. september 2015 til kurs 105 og eftir hetta til kurs 110.

Nota

23 **Eftirstillað kapitalinnskot (framhald)**

Ábyrgdarlánið er veitt av trimum føroyskum íleggjarum við eins treytum:
Lánið verður rentað við 8 % og er galdandi til 31. desember 2023. Lánið verður ikki afturgoldið í gildistíðini og kann ikki sigast upp av hvørki lántakara ella lángevara. Lántakari kann tó, um Fíggjareftirlitið frammanundan gevur loyvi til tess, afturgjalda upp til 20 % av høvuðsstólinum tann 31. desember 2018 til kurs 104. Hereftir kann lánið, um fíggjareftirlitið frammanundan gevur loyvi til tess, afturgjaldast til kurs 103 fram til 31. desembur 2019, til kurs 102 fram til 31. desember 2020, til kurs 101 fram til 31. desember 2021 og til kurs 100 fram til 31. desember 2022. Lánið er eftirstillað alla aðra ikki eftirstillaða skuld, men er stillað frammanfyri hybridan kjarnukapital og ábyrgdarpening. Um Fíggjareftirlitið gevur loyvi til tess, kann lántakari niðurskriva ábyrgdarlánið.

| | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 24 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.795 | 7.129 |
| | Broytingar, netto | 1.387 | -334 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **8.182** | **6.795** |
| 25 | Aðrar skyldur uttanfyri javnan | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 5.928 | 5.776 |
| | Tapsábyrgdir | 796 | 0 |
| | Aðrar skyldur | 31.527 | 37.074 |
| | **Aðrar skyldur uttanfyri javnan tilsamans** | **38.251** | **42.850** |

Sparikassin er eisini bundin av leigusáttmálum og stuðulssáttmálum, sum tilsamans er 1.798 tkr. fyri alt árið 2014.

| | | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|
| 26 | **Ognir settar sum trygd** | | |
| | Sektorpartabrøv | 11.368 | 4.087 |
| | Útlán | 240.756 | 269.712 |
| | **Ognir settar sum trygd íalt** | **252.124** | **273.799** |

Omanfyri standandi ognir eru settar sum trygd fyri lánimøguleikar á íalt 163,8 mió. kr. í danska tjóðbankanum. Tann 31.12.2013 vóru hesir lánimøguleikar ikki nýttir.

27 **Ognarviðurskifti**

Norðoya Sparikassi er ábyrgdarsparikassi, og er ongin ánari av peningaogn ella avlopi sparikassans. Sparikassin hevur á leið 2000 ábyrgdarar, sum 4. hvørt ár velja eitt umboðsráð, ið telur 39 limir.

28 **Nærstandandi partar**

Nærstandandi partar hjá Norðoya Sparikassa eru:

- Nevndar- og stjórnarlimir
- Assosieraðar fyritøkur

Allar avtalur millum nærstandandi partar og Norðoya Sparikassa eru gjørdar til marknaðartreytir, tó er ein akkord á 2,8 mió. kr. givin í sambandi við avtøku av Sp/f KÍ høllini.

Avtalur við nevndar- og stjórnarlimir umfata bert vanliga løn, meðan engagement við nevndar- og stjórnarlimir fram ganga av notu 29.

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|

29 **Nevnd og stjórn**

Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans ella nærstandandi hjá hesum.

| | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| Stjórn, rentustig 3,7 % | 1.713 | 1.765 |
| Nevnd íroknað starvsfólkavald, rentustig 3,7 % - 9,5 % | 39.534 | 38.860 |
| | | |
| Tilhoyrandi trygdir | | |
| Stjórn | 2.555 | 2.259 |
| Nevnd | 56.831 | 59.148 |

Vísandi til kunngerð um fíggjarligar frágreiðingar frá kredittstovnum § 119, stk. 4, hevur sparikassin valt ikki at gera hesar upplýsingar upp fyri umboðsráðið.

30 **Kredittváðar**

**Vinnugreinamiðsavnan**

Sparikassin hevur í kredittpolitikki sínum ásett at vinnulán kunnu vera upp til 45 % av kredittváða sparikassans.

Vinnuligi parturin var við ársenda 2013, eftir niðurskrivingar, 31,7 % í mun til 33,5 % í 2012.

Eisini er í kredittpolitikkinum ásett hámørk fyri, hvussu stórur partur av kredittváða sparikassans kann vera í hvørji einstakari vinnugrein, soleiðis at sparikassin ikki er ov nógv eksponeraður ímóti nakrari einstakari vinnugrein.

Sparikassin metir, at vinnulán sparikassans hava eina hóskandi spjaðing á vinnugreinar.

Talvan vísir býtið av kredittváða sparikassans íroknað ábyrgdir og eftir niðurskrivingar og burturleggingar:

| | 2013 | 2012 |
|---|---|---|
| **Almennir myndugleikar** | **3,3 %** | **0,0 %** |
| | | |
| **Vinnur** | | |
| Fiskivinna | 1,8 % | 2,8 % |
| Framleiðsluvinna | 4,4 % | 3,8 % |
| Byggivinna | 3,1 % | 3,4 % |
| Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 12,3 % | 12,6 % |
| Flutningur | 1,3 % | 0,6 % |
| Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna | 0,6 % | 1,0 % |
| Handil og umsiting av fastari ogn | 5,2 % | 6,4 % |
| Aðrar vinnur | 3,0 % | 3,0 % |
| **Vinnur tilsamans** | **31,7 %** | **33,5 %** |
| | | |
| **Privat** | **65,0 %** | **66,5 %** |
| | | |
| **Tilsamans** | **100,0 %** | **100,0 %** |

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 30 | Kredittváðar (framhald) | | |
| | **Vektaður váði í samband við kredittváða o.tl.** | | |
| | Stjórnir, tjóðbankar, lokalir myndugleikar o.tl. | 0 | 0 |
| | Fíggjarstovnar | 8.911 | 8.966 |
| | Vinnukundar | 287.669 | 287.072 |
| | Detailkundar | 234.819 | 225.423 |
| | Tryggjað við veð í fastogn | 277.186 | 293.423 |
| | Trot og eftirstøður | 90.778 | 122.168 |
| | Dekkað lánsbrøv | 0 | 4.583 |
| | Aðrar eksponeringar, herundir aktiv uttan mótpart | 67.861 | 74.300 |
| | **Tilsamans** | **967.225** | **1.015.935** |

Bonitetsbólking

Sparikassin bólkar øll útlán í bonitetsbólkar samsvarandi karakterstiga Fíggjareftirlitisins. Bólkarnir eru hesir: Bólkur "3" eru kundar við góðum boniteti, "2a" eru kundar við vanligum boniteti, "2b" eru kundar við ávísum veikleikateknum, "2c" eru kundar við munandi veikleikateknum og "1" eru niðurskrivingarkundar.

Sparikassin endurmetir reguliga ásetingina av boniteti. Sparikassin avsetur orku til at viðgera veik engagement herundir serliga engagement við boniteti "2c" og "1", hetta fyri at fyribyrgja størri niðurskrivingum og avskrivingum.

Bonitetsásetingin hevur eisini týðandi leiklut í sambandi við viðgerð av nýggjum lániumsóknum.

Landafrøðilig spjaðing

Í dag er størri helmingurin av útlánunum í sparikassanum frá upprunaliga virkisøki sparikassans í Norðoyggjum, meðan minni helmingurin er í teimum økjunum, sum deildir sparikassans í Saltangará, Fuglafirði og Tórshavn fevna um. Sparikassin metir, at landafrøðiliga spjaðingin av útlánum sparikassans er umboðandi fyri landið, og tí ikki er at rokna sum ein serligur váði. Hinvegin ásannar sparikassin, at føroyski búskapurin er merktur av størri sveiggjum enn størri búskapir, sum byggja á meiri fjøltáttaða framleiðslu, og at tað kann roknast at síggjast aftur í fíggjargeiranum.

**Stór engagement, sum eru størri enn 10 % av basiskapitalinum**

Sparikassin hevur nøkur engagement, sum eru 10 % ella meira av basiskapitalinum. Summurin av stórum engagementum var íalt 40,9 % av basiskapitali sparikassans í 2013. Hetta er munandi minni enn eitt ár frammanundan, tá talið var 56,8 %, sum sparikassin metti at vera ov høgt. Eftirlitsdiamanturin hjá Fíggjareftirlitinum ásetur markið til 125 %. Sparikassin er nøgdur við gongdina í lyklatalinum fyri stór engagement og væntar at tað er á sama støði við endan á 2014.

20 tey størstu engagement sparikassans

Hesi engagement (íroknað tey sum eru størri enn 10 % av basiskapitalinum, sum eru viðgjørd omanfyri) vóru áðrenn niðurskrivingar íalt 343 mió. kr. svarandi til 21,8 % av sparikassans útlánum og ábyrgdum áðrenn niðurskrivingar og burturleggingar.

30 Kredittváðar (framhald)

Útlán sparikassans til 20 tey størstu engagementini høvdu hetta bonitetsbýtið í 2013 og 2012:

| | 2013 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|
| Bonitetur | % partur | mió. kr. | % partur | mió. kr. |
| 3 og 2a | 49 % | 169 | 36 % | 119 |
| 2b | 14 % | 49 | 23 % | 77 |
| 2c | 17 % | 59 | 16 % | 55 |
| 1 | 20 % | 67 | 25 % | 84 |
| **íalt** | | **344** | | **335** |

Sparikassin hevur sum heild góðar trygdir og avmarkað blanko. Viðvíkjandi 20 teimum størstu engagementunum er samlaða varliga uppgjørda blanko 55 mió. kr. við ársenda 2013 móti 70 mió. kr. í 2012. Í uppgerðini av blanko upp á 55 mió. kr. er útlán til kommunur ikki íroknað. Av blanko upp á 55 mió. kr. eru 9,4 mió. kr. niðurskrivaðar. Í solvenstørvi sparikassans er blanko hjá kundum við boniteti 1 og 2c, sum ikki er niðurskrivað, avsett við 100 %.

Privatkundar
Yvirhøvur eru útlán sparikassans til privat í stóran mun fevnd av trygd í bústaðum og øðrum aktivum. Sparikassin hevur vanliga 1. veðrætt í bústaðinum.

Privatkundar eru 65 % av kredittváða sparikassans, tá niðurskrivingar og burturleggingar eru frádrignar. Váði sparikassans frá privatengagementum avspeglar búskaparligu gongdina í landinum, herundir gongdina í tøka peninginum eftir skatt hjá húsarhaldunum og prísgongdina á húsamarknaðinum.

Útlán sparikassans til privat hevði hetta bonitetsbýtið í 2013 og 2012:

| | 2013 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|
| Bonitetur | % partur | mió. kr. | % partur | mio. kr. |
| 3 og 2a | 56 % | 573 | 50 % | 520 |
| 2b | 29 % | 299 | 33 % | 347 |
| 2c | 7 % | 73 | 9 % | 97 |
| 1 | 8 % | 79 | 8 % | 86 |
| **íalt** | | **1.024** | | **1.050** |

Niðurskrivað eru 29 mió. kr. av skuld til privatkundar.

Samansetingin av boniteti hjá privatkundum er batnað í 2013 í mun til 2012.

Kapitalur til dekning av kredittváða hjá kundum við fíggjarligum trupulleikum
Í uppgerð av solvenstørvi pr. 31.12.2013 er avsett 8 % av vektaðum ognum. Afturat hesum er avsett íalt 35 mió. kr. móti møguligum tapum vegna útlán til kundar við fíggjarligum trupulleikum. Í tann mun sparikassin kemur at staðfesta niðurskrivingartørv uppá hesi útlán í framtíðini, verður niðurskrivingin bókað í rakstrarroknskapi sparikassans og tikin úr uppgerðini fyri solvenstørv. Treytað av at avsetingin er nøktandi ávirka hesar niðurskrivingar ikki yvirdekningin í solvensi sparikassans, sum er munurin millum solvenstørv og faktiskan solvens.

Av nevndu avseting uppá 35 mió. kr. viðvíkja 20,9 mió. kr. kundum, sum eru 10 % av basiskapitalinum ella størri.

| Nota | | 2013<br>1.000 DKK | 2012<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 31 | **Marknaðarváðar** | | |
| | **Gjaldoyraváði** | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 379 | 601 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 0 | 0 |
| | **Gjaldoyraábending** | **379** | **601** |
| | | | |
| | Gjaldoyraábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,2 % | 0,4 % |
| | | | |
| 32 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | 3.461 | 7.500 |

# Nevnd, grannskoðaranevnd og stjórn

## Nevnd

John Petur Danielsen, cand.polit.
Argir. Føddur 1949.
(nevndarformaður)
Innkomin í nevndina í 2009 og stendur fyri vali í 2015
Nevndarsamsýning: tkr. 150
Onnur leiðslustørv: einki

Jóannes Hansen, studentaskúlalærari, cand.mag.
Toftir. Føddur 1955.
(næstformaður)
Innkomin í nevndina í 2007 og stendur fyri vali í 2016
Nevndarsamsýning: tkr. 112,5
Onnur leiðslustørv: einki

Jóhanna á Tjaldrafløtti, skúlastjóri,
føðslu- og húsarhaldsfrøðingur, dietist
Klaksvík. Fødd 1962.
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2014
Nevndarsamsýning: tkr. 75
Onnur leiðslustørv: Lætt & Leskiligt Sp/f, stjóri

Kristian Martin Rasmussen, reiðari, skipari
Klaksvík. Føddur 1947.
Innkomin í nevndina í 2010 og stendur fyri vali í 2016
Nevndarsamsýning: tkr. 75
Onnur leiðslustørv: Palli hjá Mariannu P/f, nevndarformaður,
Hvalnes P/f, nevndarformaður,
Christian í Grótinum P/f, nevndarformaður,
Tjaldur P/f, nevndarlimur

Karl Heri Joensen, grótlaðari, bóndi
Klaksvík. Føddur 1955.
Innkomin í nevndina í 2011 og stendur fyri vali í 2014
Nevndarsamsýning: tkr. 75
Onnur leiðslustørv: KHJ Nýgerð Sp/f, stjóri
Norðoya Røktarheim, nevndarformaður

Petur Alberg Lamhauge, ráðgevi, cand.merc.
Hoyvík. Føddur 1948.
Innkomin í nevdina í 2012 og stendur fyri vali í 2015
Nevndarsamsýning: tkr. 75
Onnur leiðslustørv: einki

Julianna Thomsen, deildarleiðari
Klaksvík. Fødd 1959.
Starvsfólkavald
Innkomin í nevndina í 2006 og stendur fyri vali í 2016
Nevndarsamsýning: tkr. 75
Onnur leiðslustørv: einki

Guðrið Lava Olsen, vinnukundaráðgevi
Leirvík. Fødd 1962.
Starvsfólkavald
Innkomin í nevndina í 2008 og stendur fyri vali í 2016
Nevndarsamsýning: tkr. 75
Onnur leiðslustørv: einki

Tummas Martin Sólsker, vinnukundaráðgevi, HD-R
Klaksvík. Føddur 1977.
Starvsfólkavaldur
Innkomin í nevndina í 2012 og stendur fyri vali í 2016
Nevndarsamsýning: tkr. 75
Onnur leiðslustørv: einki

## Grannskoðaranevnd

John Petur Danielsen, innkomin í grannskoðaranevndina í 2010, samsýning tkr. 12
Jóannes Hansen, innkomin í grannskoðaranevndina í 2010, samsýning tkr. 6
Petur Alberg Lamhauge, innkomin í grannskoðaranevndina í 2012, samsýning tkr. 6

## Stjórn

Marner Mortensen, stjóri, HD-R
Klaksvík. Føddur 1963.
Innkomin sum stjóri 12.03.2010
Onnur leiðslustørv: Elektron, nevndarlimur

# Umboðsráð

| | |
|---|---|
| ABSALON Í BUÐ | FO-740 HVANNASUND |
| ALEXANDUR JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| ÁLVUR KLAKK | FO-700 KLAKSVÍK |
| ANDREAS JOSEPHSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| ANNA MARIA JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| BERGUR Á REYNATRØÐ | FO-620 RUNAVÍK |
| DEBES CHRISTIANSEN | FO-730 NORÐDEPIL |
| ERLING PETERSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| EYÐÁLVUR M. JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| FINN KJØLBRO | FO-700 KLAKSVÍK |
| FINNUR SIVERTSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| GULLAK GULLAKSEN | FO-767 HATTARVÍK |
| HANS JÁKUP KALLSBERG | FO-750 VIÐAREIÐI |
| HANS JOSEPHSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| HEINI ÓSÁ | FO-700 KLAKSVÍK |
| HERGERÐ ZISKASON | FO-700 KLAKSVÍK |
| HILMAR KALSØ DANIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÁKUP J. PETERSEN | FO-750 VIÐAREIÐI |
| JOHN P. DANIELSEN | FO-160 ARGIR |
| JÓANNES HANSEN | FO-650 TOFTIR |

| | |
|---|---|
| JÓGVAN EDMUND Á GEILINI | FO-765 SVÍNOY |
| JÓGVAN JOENSEN | FO-798 TRØLLANES |
| JÓHANNA Á TJALDRAFLØTTI | FO-700 KLAKSVÍK |
| JÓHANNA CHRISTIANSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| KALLI VÁÐKLETT | FO-700 KLAKSVÍK |
| KARL HERI JOENSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| KÁRI KLETTSKARÐ Í KONGSSTOVU | FO-785 HARALDSSUND |
| KJARTAN HANSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| KRISTIAN MARTIN RASMUSSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| MARKUS TUMMAS JACOBSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| MORTAN JOHANNESEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| MUNDA LANGAARD | FO-520 LEIRVÍK |
| NIELS V. PETERSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| OLIVUR THOMSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| PEDER T. HAAHR | FO-416 SIGNABØUR |
| SÁMAL PETUR LERVIG | FO-480 SKÁLI |
| SIGGVARD JOENSEN | FO-100 TÓRSHAVN |
| SØREN ZISKA JACOBSEN | FO-700 KLAKSVÍK |
| VICTOR NIELSEN | FO-700 KLAKSVÍK |

www.ns.fo